# Povl Dissing og Benny Andersen til Føroya

**Sunnukvøldið 23. apríl kl. 16 verða teir báðir vælumtóktu donsku tónleikararnir, Povl Dissing og Benny Andersen, at hoyra í Norðurlandahúsinum**

MENTAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Povl Dissing og Benny Andersen hava verið kendir á tí danska listapallinum í mong áratíggju, og síðan 1973 hava teir verið kendir millum danskarar í øllum aldri, tá ið plátan "Svantes Viser" kom út. M.a. er sangurin "Svantes lykkelige dag" vorðin ein tann størsta fólkaognin í nýggjari tíð, og ofta verður trivið í hann, tá felagssangur er á skránni. Eisini Eivør Pálsdóttir hevur havt hann á sínari sangskrá.


*Povl Dissing og Benny Andersen (myndin) verða at hoyra í Norðurlandahúsinum í vár*

Povl Dissing er í sínum tulkingum sermerktur sangari sum fáur, og eingin kann sum Benny Andersen venda tí danska málinum á høvdið, og er hann enntá onkuntíð í donskum fjølmiðlum skírdur tjóðarskald.

Úr Norðurlandahúsinum verður m. a. sagt, "at megin í tulkingunum hjá Dissing innrammar tann undirspælda humorin og vinsæla hitan, ið er so Benny Andersenskur. Svante og Roselina eru mið-persónarnir í heiminum hjá hesum skaldsliga samstarvi, har gerandisdagurin verður ævintýrligur og undurfullur".

# Virðisløn fyri íslendsk-føroyska orðabók

**Jón Hilmar Magnussen, sum hevu rgjørt íslendsk-føroyska orðabók, fær serliga virðisløn frá mentamálaráðharranum**

VIRÐISLØN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur gjørt av at lata íslendska rithøvundanum Jón Hilmari Magnusson eina serstaka virðisløn fyri íslendsk-føroysku orðabókina.

Jón Hilmar Magnússon er føddur 7. oktober 1925 í Ási í Glertorpi í Íslandi. Hann er útbúgvin lærari og hevur verið lærari, skúlastjóri og prentsmiðjuánari. Síðstu tíggju árini hevur Jón Hilmar Magnússon starvast við at skriva og yrkja. Jón Hilmar hevur havt nógv samband við Føroyar, og eru fýra døtur hansara giftar føroyingum. Hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri Føroyum og føroyska málinum, og er íslendsk-føroyska orðabókin eitt úrslit av hesum áhuga.

– Íslendsk-føroyska orðabókin er eitt valaverk og ein varði í viðurskiftunum millum Ísland og Føroyar. Tað hevur leingi verið tørvur á slíkari orðabók, og orðabókin hjá Jón Hilmari er eitt leingi saknað íkast til tess at styrkja mentanarligu bondini millum íslendsku og føroysku tjóðirnar, sigur landsstýrismaðurin í tíðindaskrivi.

Landsstýrismaðurin í mentamálum heldur, at vit føroyingar eiga at virðismeta verkið hjá Jón Hilmari, og hevur tí gjørt av at heiðra hann við eini serstakari virðisløn.

Virðislønin verður handað Jón Hilmari á samkomu fyri innbodnum og fjølmiðlum, sum verður í Mentamálaráðnum týsdagin 17. januar kl 14.00.

# Oljuprísurin hækkaður aftur

**Tað tykist, sum fíggjarmarknaðirnir ikki rættiliga hava givið sær far um, at oljuprísurin hækkar støðugt**

BÚSKAPUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*




Í seinastu útgávuni av tíðarritinum hjá Kaupthing, Útlit og Rák, verður m.a. gjørt vart við, at oljuprísurin er hækkaður heili 11 % síðan undanfarnu útgávu.

Tað tykist, sum fíggjarmarknaðirnir ikki rættiliga hava varnast hækkingina enn, og minnir hetta um støðuna seinasta summar, tá oljuprísurin hækkaði heili 30 %, uttan at marknaðirnir lótu við seg koma.

Tá marknaðirnir raknaðu við, fekk oljuprísurin stóran týdning fyri bæði lánsog partabrøv. Tá varð dentur lagdur á, at høgi oljuprísurin kundi fáa búskaparvøksturin at lækka, og fekk tí eisini renturnar at lækka.

Dentur hevur í seinastuni verið lagdur á prísvøkstur, so um oljuprísurin heldur sær her á leið, er mest sannlíkt, at ótti fyri prísvøkstri fer at fáa renturnar at hækka eitt sindur aftur.

Kaupthing metir, at oljuprísurin ta komandi tíðina fer at sveiggja millum 57 og 65 dollarar fyri tunnuna.



TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA
Skrásetingarnr.: EF 970 KM: 108.900
Árgangur: 21.07.99 Seinast sýnaður: 18.08.04
Kr. 63.000,-


TOYOTA COROLLA 1,3
Skrásetingarnr.: DH 084 KM: 126.000
Árgangur: 15.11.99 Seinast sýnaður: 13.04.05
Kr. 58.000,-


TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: DR 131 KM: 131.000
Árgangur: 22.07.98 Seinast sýnaður: 04.03.05
Útgjald kr. 35.410,- Kr. 98.000,-


TOYOTA COROLLA 2,0 LINEA TERRA D-4D — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: SV 879 KM: 75.000
Árgangur: 01.05.02 Seinast sýnaður: 01.05.02
Kr. 148.000,-


TOYOTA AVENSIS SOL 2,0 TDi - Stw. — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: VK 647 KM: 78.000
Árgangur: 21.01.99 Seinast sýnaður: 26.05.05
Útgjald kr. 36.960,- Kr. 105.000,-


KIA SPORTAGE 2,0 Bensin 4X4 Vørubilur
Skrásetingarnr.: TL 334 KM: 86.000
Árgangur: 10.10.97 Seinast sýnaður: 06.12.04
Kr. 35.000,-


TOYOTA RAV 4 2,0 D-4D 3 HURÐ 4x4 — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: VS 984 KM: 58.000
Árgangur: 24.04.02 Seinast sýnaður: 24.04.02
Kr. 205.000,-


SKODA FABIA COMBI 1,4 — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: SN 641 KM: 64.000
Árgangur: 26.06.02 Seinast sýnaður: 26.06.02
Útgjald kr. 24.650,- Kr. 98.000,-


TOYOTA CARINA 2,0 XL T-Diesel
Skrásetingarnr.: VM 271 KM: 122.500
Árgangur: 10.06.97 Seinast sýnaður: 07.01.04
Útgjald kr. 24.010,- Kr. 68.000,-


SSANGYONG MUSSO TD — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: DV 753 KM: 90.000
Árgangur: 28.05.99 Seinast sýnaður: 21.03.05
Kr. 97.000,-

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo
REYNI SERVICE P/F